FÓTBÓLTSSKÓGVAR
Nike stødd 40, 100 kr. Adidas stødd 38 2/3, 150 kr. – Adidas (innandura) stødd 39 1/3, 200 kr. Allir eru lítið brúktir.
Tlf. 316580

TROYGGJA TIL SØLU
Troyggja til føroyskan mannafólkabúna til sølu.
Tlf. 441226

TIL SØLU
Svartar, hondbundnar hosur til mannfólkabúnan, std. 42-43 til nakað breiðan fót, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 317449

TIL SØLU
Myrkablá mannfólkatroyggja til før. búnan, std. ca. M, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 422615

Samband

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein 60 ára gamal maður, sum ynskir at koma í sambandið við 50-60 ára gamla kvinnu. Eg eri erligur og álítandi, eri ungur í sinni – ein dámligur maður. Tú, sum lesur hetta bræv, eitt skalt tú vita, at svikin av mær skalt tú ikki verða, tað lovi eg tær. Hvat sigur tú til hetta, er hetta ikki vert at royna, og er hetta ikki nakað fyri teg. Eg havi bil. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 29.05.

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30.
LÍF

Súkklur

SÚKKLA TIL SØLU
Damu/gentusúkkla við 18 gearum og hondbremsu til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 310215

SKUTARI
»Trekker Road« til sølu, hevur rút + box, er 3 ár.
Tlf. 422477

EIN PUCH
harra trakkisúkkla, 3 gear, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 448097/253867

YAMAHA KNALLERT
til sølu, vælhildin og er sera vøkur.
Tlf. 421244/252048, Bjartur

KNALLERT
Suzuki 50 í góðum standi til sølu.
Tlf. 373380

Motorsúkkla til sølu
Ein Suzuki GSX 550 Motorsúkkla til sølu. Er í sera góðum standi.
Tlf. 210499 - 210762

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Súkkla, bert brúkt í 2 mðr., til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 250225

TIL SØLU
Næstan óbrúkt dreingjasúkkla til sølu fyri 2.500 kr. Nýprísur 3.600 kr.
Tlf. 250413

SÚKKLA BÍLIGA TIL SØLU
Vælhildin, blá fjallasúkkla v/ 18 gearum til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 219608 / 314110

Til sølu
Ein fjallasúkkla í góðum standi til sølu.
253973 - 444378

FJALLASÚKKLA
Ein Winther fjallasúkkla stødd 55 cm. Við 18 gearum til sølu fyri 1700 kr.
Tlf. 251221

Teldur

TELDA TIL SØLU
Pentium III hon hevur dvd og 3d hátalarar til sølu fyri 9.500 kr.
Tlf. 255220

RAM TIL SØLU
Óbrúkt 256MB PC 133 RAM til sølu fyri 1200 kr.
Ring 213496

ÓBRÚKT SPÆL
til Playstation, Rainbow SIx, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 448288

TIL SØLU
Obrúkt Pingo spæl til teldu til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 448288

TIL SØLU
Eitt eicon diva ISDN T/A modem til sølu. Prís 1200 kr.
Tlf. 250814

TIL SØLU
Tveir Tanberg hátalarar úr ljósari eik, br=86, d=42, h=47 cm, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 314640

Tónleikur

GUITARFORSTERKARI
av slagnum Carlsbro 150 w til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 252939

TIL SØLU
Eitt komplett bilstereo anlegg av merkinum Sony. Ein 4x200 W forsterkari, ein 200 W subwoofari á 450 W, 2x230 W hátalarar. Pioneer equalizari og Kenwood føguspælari 4x35 W. Leidningur fylgir við. Lítið brúkt.
Tlf. 311830 - 211830

TIL SØLU
Ein bilforsterkari, subwoofari, og ein basskanón til sølu fyri 3.500 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 250644

TIL SØLU
JVC bilradio við bandavspælara og cd-box til 12 cd. 4x35 watt. Hálvt ára gamalt. 2 Sony hátalarar, 2300 w.
Tlf. 373250

YNSKIST
Plátuspælari við 3 snúningum - 33, 45 & 78 - ynskist til keyps.
Tlf. 361004

TIL SØLU
12 streingjaður Yamaha guitari til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 320543

TIL SØLU
Carlsbro GLX40 40 watts forstyrkjari. Lítið brúktur 2 ára gamal guitar-forstyrkjari til sølu fyri 2300,-
Tlf. 448018 eftir kl. 18.00

Út- & Sjónvarp

VIDEO KAMERA
Eitt sera gott vedeo kamera av mrk. "Sony" 12x Hi-Fi stereo Hi 8 Handycam, Bert 2 ára gamalt við fjarstýring, bondum og tasku til sølu fyri kr. 5.000. Nýprísur kr. 9.000.
Tlf. 223232 - 422262

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Video v/ fjarstýring til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 421424

Ymiskt

VIDEOKAMERA
Sony Handycam 6 x 20 om, við blits, ladara til battarí, adaptara til sjónvarp, bondum og tasku til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 314347

PARABOLSKERMUR
80 cm. við høvdi bíliga til sølu.
Tlf. 448196/252383

TERMOVINDEYGU TIL SØLU
Ymiskar støddir av brúktum termovindeygum til sølu.
Tlf. 220710

OPIÐ FYRI BÓLKUM
Fjalsgarðum tekur móti bólkum. 5 sovikæmur – vælútgjørdur køkur og gestakøkur – stórur salur og matarstova.Fjalsgarður,690 Oyndarfjørður
Tlf. 332900

FELAGIÐ EINHERJAR
Til limirnar í Felaginum Einherjar. Summartiltakið í ár verður hildið fríggjadagin tann 27. juli. Tað verður lýst nær og hvar seinni. Sí annars heimasí?una: http://heima.olivant.fo/~bella/
Nevndin

FAGNAÐARDAGUR
á Selatrað. 2. hvítusunnudag kl. 13.00 - 17. 00 verður Fagnaðardagur á Skótadeplinum á Selatrað. Nógv tiltøk verða á skránni, t.d. primitiv matgerð, poppkorn á báli, klintriveggur, gummibátur, forðarenning, skattajakt, rør-skreiðibreyt, tombola, fiskibrunnur, svampakast, seymsláing, Leirvikstjaldið, 21-spæl, kondibingo, skjótibreyt, lutaseðlar við góðum vinningum og kaffisøla. Unnið tykkum ein góðan dag á Selatrað - við allari familjuni.
KFUM-skótarnir í Føroyum

LÍTIÐ BRÚKT
hvítt baðikar til at innbyggja, stødd 160 x 70 til sølu fyri 1.000 kr. Akvarium 120 l. til sølu fyri kr. 2000,- 19 fiskar ymisk sløg og 1 froskur, pumpa, termostatur o.a. er við í prísinum.
Tlf. 333450 eftir kl. 17

ÁHEITAN
Um tað er nakar, sum skal flyta til Noreg mánaðarskifti juli/aug., vinarliga ring til mín.
Tlf. 0047-35952118

TVÆR MYNDIR
av Christian Rosenmeyer: Eystaravág & Vestaravág »Prospects of Tórshavn 1778«, talmerktar, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 216089

VIDEO KAMERA
Eitt sera gott video kamera av mrk. "Sony" 12 x Hi-Fi stereo Hi 8 Handycam, bert 2 ára gamalt við fjarstýring, bondum og tasku, til sølu fyri kr. 5.000. Nýprísur kr. 9.000.
Tlf. 223232 - 422262

ERICSSON RS 310
til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 421451

TIL SØLU
Ísmaskina og tvey køliskáp til kiosk til sølu.
Tlf. 455591 - 215691

TIL SØLU
Ein lítið brúkt, 4 mðr. gomul Siemens C35i til sølu fyri einans 1.200 kr.
Tlf. 254050

ER NAKAR
sum kann fylgja einari 7 ára gamlari gentu niður við Atlantic tann 30. juni kl. 11.15?
Tlf. 321702

REIGGJUSTATIV
ynskist til keyps.
Tlf. 321702

TIL SØLU
60 horn, harav 10 veðrahorn, til sølu. Eru vaskað og turkað.
Tlf. 252939

FERÐASEÐIL TIL SØLU
Ein ferðaseðil við Norrønu til Bergen og aftur er til sølu fyri kr. 1.200,-
Tlf 319489

NMT 450 FARTELEFON
av slagnum Nokia 650 til sølu.
Tlf. 216085

TIL SØLU
Nýggj, óbrúkt brosja til sølu. Merkið er »Vikingaskipið«.
Tlf. 317673, e. kl. 18

FERÐ TIL SØLU
Ferð við Norrønu til Dk og aftur fyri tveir pers. í 2-mans kamari v/ vc og bað til sølu fyri 5.000 kr., íroknað bilflutning, virði 6.700 kr. Galdandi til 9. juni 2001 og frá 18. aug. til endan av 2001.
Tlf. 004551603790 ella 211488

SINGER SEYMIMASKINA
til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319747, e. kl. 17

ERICSSON T 28 S
við tasku og billadara til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 319927

LOPPUMARKNAÐUR
á Skálafjarðarstevnuni. Tikið verður ímóti lutum í Støkk høllini fríggjadag og leygardag. IKKI KLÆÐI.
Støkk

YNSKIST
Tvær brúktar úthurðar ynskjast til keyps.
Tlf. 451295

TIL SØLU
Lítið brúktar Ultra-wheels in-line rullískoytur, std. 41, til sølu fyri 700 kr. Nýprísur 1.899 kr. Útgerð fylgir við.
Tlf. 321091

VINDEYGU YNSKJAST
Fýra vindeygu, 100 cm høg og 120 cm breið, ynskjast til keyps.
Tlf. 315991

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Ektað samurai svørð til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 421424

SUNDA PENSIONISTAFELAG
Útferðin í Sandoynna verður leygardagin 9. juni. Bussur koyrir frá Shellstøðini við Streymin kl. 9.00. Tekning á tlf. 423357-422055-423349 í seinasta lagi mikudagin 6. juni.
Nevndin

TIL SØLU
Ericsson T18 vid Chatboardi til sølu fyri 1200kr,-
Tlf. 251221

HEILSANIR

Góða Hertha
Hjartaliga tillukku við 22 ára degnum, alt tað besta í framtíðini. Her ert tú cool.
Ynskir ein vinkona

Góði Árni
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum.
Ynskir Hjørdis

Góði Búgvi!
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum í dag. Vit ynskja tær alt tað besta.
Bestu heilsanir frá mammu, babba, Sámali og Høgna

Góði Janus
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag. Eisini ein heilsan til Maritu, sum fyllir 9 ár 10. juni.
Bestu heilsanir frá okkum í Klaksvík

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti hjá Beintu og Suna, Lýðarsvegur 11.
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli og onki møti vegna Hvítusunnustevnuna.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Hvítusunnudag kl. 11 hámessa við Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Eingin sunnudagsskúli verður í morgin.
2. Hvítusunnudag kl. 11 hámessa við Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Tað er makt í bøn. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið onki møti. Vegna Hvítusunnustevnuna á Nabb við Aril Edvardsen úr Noreg, vera ongi møti í Rhema.

Ebenezer
Hvítusunnudag kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
2. Hvítusunnudag kl. 18 evangel. møti.

KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin 24. juni kl. 14 gera KFUM og KFUK útferð um viðrar við Norðlýsinum, vestur um Hestoynna. Sigið frá áðrenn 11. juni á tlf. 311928 vilja tit við. Havi matpakka og okkurt drekkandi við. Ferðin varar 5 tímar. Luttøkugjald 200 kr.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 19 Teen Xtreme, í annaðkvøld kl. 19 og leygardagin kl. 10 og 19 hvítusunnustevna í ítróttarhøllini á Hálsi, kl. 22.30 lovsongskonsert í ítróttarhøllini á Hálsi. 1. Hvítusunnudag kl. 11 og 18 og 2. Hvítusunnudag kl. 11 og 18 Hvítusunnustevna í Ítróttarhøllini á Hálsi. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti við ungdómi frá Logos II. Leygardagin kl. 16.30 bønarløta – kvinnur. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við vitjandi frá Logos II. Barnaansing verður.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Hóskvøldið kl. 20 bíbliutími við Gunnar Reynslág. Evni: Bøn – Jesus: Matt. 26, 36-46, 27, 45-46, Luk. 23, 34-46. Heimasíða okkara: www.koma.fo

Filadelfia, Sundalagið
Í dag kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 bøn, kl. 20 kvinnurnar samlast. Hvítusunnudag ongin sunnudagsskúli, 2. hvítusunnudag kl. 18 møti við Hans Eiler Hammer.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Hvítusunnustevnan byrjar leygarkvøldið kl. 20. Hvítusunnudag verður møti kl. 18 og 2. hvítusunnudag kl. 20. Talarar og streingjakór á meinigheitshúsinum úr Havn luttaka øll kvøldini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 útimøti í Vági um viðrar. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jens Vestergaard.

Føroyskt møti í Hirtshals
Føroyskt møti verður nú leygarkvøldið tann 2. juni kl. 19.00 í missiónshúsinum í Hirtshals við Hera Eltør, Aulum, kaffiborð aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 28. mai:
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18. Seyma føroyskar fýrkantar saman til teppir. Á fyrstu hædd.
kl. 15-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin og túrin umborð á Logos hósdagin kl. 16 á tlf. 316491.
Túrur til Runavíkar fyri pensjónistar og fyrrverandi sjómenn umborð á Logos II hósdagin kl. 16.
Bókasøla í kjallaranum alla vikuna.
Týsdagin 29. mai:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum, síðsti partur. Hjørdis Háberg, Marjun Nielsen lesur.
Mikudagin 30. mai:
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
Hósdagin 31. mai:
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Túrur umborð á Logos II, úr Havn kl. 15.00.
Fríggjadagin 1. juni:
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106. E-mail: sara@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfrið Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til
Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Svøríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570

BRÚDLEYP

Leygardagin 2. juni kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju, Esther Lindenskov, Tórshavn og Hjalmar Hvítklett, Sørvágur. Brúðarveitslan verður fyri innbodnum í Pállstovu.

Leygardagin 16. juni kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálabotni Olivia H. Joensen, Skálabotn og Jákup Súni Berg, Tórshavn. Veitslan verður í leguhúsinum í Nesvík kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 1. juni á tlf. 441596, 315003 ella 254404.

Leygardagin 23. juni kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Oddbjørg Askham, Hvannasund og Rúni Sigurðsson, Klaksvík. Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juni á tlf. 457514, 452002 ella 457522.

SILVURBRÚDLEYP

Hósdagin 21. juni hava hjúnini Andor og Jona Isaksen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum fríggjakvøldið 22. juni kl. 19.30. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, verða vinarligast biðin um at siga frá áðrenn 1. juni á tlf. 456515 ella 250247.

GULLBRÚDLEYP

Í dag, hósdagin hava hjúnini Solveig og Jacob Hansen, Leirvík, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.